# ítróttur

Nr. 189 • hósdagur • 3. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Zivkovic skal venja VB

**Vágbingar boðaðu týsmorgunin frá, at Predrag Zivkovic verður leikandi venjari hjá felagnum komandi árið**

VB-VENJARI
*Jákup Mørk*

Eitt av mongu føroysku feløgunum, sum hava nýtt heystið til at mett um, hvør skal verða venjari komandi árið, er VB. EFtir at Dragan Kovacevic tíðliga í kappingini varð loystur úr starvinum, hevur tað verið Marek Wierzbicki, sum hevur staðið fyri venjingunum, og samstundis hevur leiðslan í felagnum so kannað, hvørjir møguleikar vóru í hyggju til komandi ár.

### Innan bøgarðarnar

Sum tað hevur tørnað út, so skuldi tað vísa seg, at leiðslan í felagnum ikki nýttist at leita so øgiliga langt, til tess at finna sær ein nýggjan venjara.

Valið er ístaðin fallið á Predrag Zivkovic, sum tey trý seinastu árini hevur leikt við á besta mansliðnum hjá felagnum. Predrag hevur annars eisini virkað sum ungdómsvenjari hjá felagnum hesi árini, og besta úrslitið mundi hann fáa í ár, tá tað eydnaðist VB at vinna dreingjadeildina annað árið á rað.

Umframt at venja liðið fer Predrag eisini at spæla fótbólt á besta liðnum hjá VB, og sum vanligt hevur verið seinnu árini, so fer hann so ikki at vera einsamallur útlendingur. Í øllum førum hevur VB boðað frá, at teir hava longt sáttmálan við Slobodan Madzar, sum kom til felagið undan hesum kappingarárinum.



*Komandi kappingarárið verður Predrag Zivkovic leikandi venjari hjá VB*

## Ungir meistarar og silvurvinnarar

Tað er ikki bara í Vági, at tað glógvar í teimum ungu fótbóltsspælarunum og har eitt miðvíst ungdómsarbeiði gevur góð úrslit.

Hóast tað gekk so illa sum tað kundi hjá besta mansliðnum í fótbólti hjá aldursforsetanum í føroyskum fótbólti, eydnaðist tað TB at vinna heiðursmerki í teimum yngru deildunum.

Sostatt blivu smápiltarnir hjá TB føroyameistarar í ár, umframt at teir vunnu AB kappingina og kappingina um Arnfinn steypið, sum Royn skipar fyri.

Samstundis eydnaðist tað piltunum hjás TB at vinna silvur í FM- kappingini.

*Her eru smápiltarnir hjá TB avmyndaðir, tá ið teir vórðu heiðraðir á fótbóltsvøllinum á Sevmýri í hálvleikinum seinasta sunnudag: Aftara rað frá vinstru eru teir Jonhard Ferjá, Gilli Sørensen, Fróði Jensen og Hugin Albinus. Fremra rað frá vinstru: Jákup Thomasen, Rógvi Joensen, Ragnar Joensen og Teitur Justinussen*

*Venjari er Poul F. Joensen*





*Her eru piltarnir hjá TB, sum vunnu silvur í FM kappingini. Aftara rað frá vinstru eru teir Milan Cimburovic við dóttrini, Kristinu, Hans Mortensen, Petur Mortensen, Sjúrður Ferjá, Chris Hammerfoss, Martin Tausen, Gunnleif Olsen og Gunnar í Dali. Fremra rað frá vinstru eru teir: Jón Magnussen, Tróndur Tummasarson, Mikael Jespersen, Jan Smedemark, Bárður Hentze, Benjamin Petersen, Ottar Olsen og Marco Steinkross*

## Litaviski hópurin

Litaviski landsliðsvenjarin, Benjaminas Zelkevi-ci-us, hevur nú gjørt av, hvøjar leikarar hann fer at seta sítt álit á til komandi landsliðsuppgávurnar, sum verða á heimavølli móti Føroyum og á útivølli móti Íslandi.

Sum tað sæst á hópinum, so er bert talan um ein leikara úr heimligu kappingini, meðan allir hinir leika við ymsum útlendskum feløgum. Flestu av hesum eru feløg í russisku deildini, men talan er eisini um leikarar, sum hava sína dagligu gongd í eitt nú Danmar, Portugal og Ísrael. Hópurin sær annars soleiðis úr:

**Málverjar**
Gintarus Stauce, Fostiras Athen (GRI)
Sydranus Karcemarskas, Dynamo Moskva (RUS)

**Verjuleikarar**
Aurelius Skarbalisu, Brøndby IF (DAN)
Adrius Skerla, Dunfermline Athletic (SKO)
Marius Stankevicius, Brescia Calcio (ITA)
Deividas Semberas, CSCA Moskva (RUS)
Dainius Gleveckas, Shakhter Donetsk UKR)
Rolandas Dziaukstas, Saturn Ramen (RUS)

**Miðvallarar**
Ignas Dedura, Skonto Riga (LET)
Raimondas Zutautas, Makkabi Haifa (ÍSR)
Saulius Mikalajunas, Fakel Voronezh (RUS)
Tomas Razanauskas, Akratitos Athen (GRI)
Deividas Cesnaukas, Dynamo Moskva (RUS)
Nerijus Barasa, Krylya Svetov Samara (RUS)

**Áleyparar**
Edgaras Jankauskas, Benfica Lissabon (POR)
Robertas Poskus, Krylya Svetov Samara (RUS)
Arturas Fomenko, Rostselmash Rostov (RUS)
Mindaugas Gardzijauskas, Ekranas Kaunas (LIT)



## NSÍ eigur góða framtíð



*NSÍ smádreingir. FM vinnarar 2002. Aftanfyri frá vinstru: Abraham Løkin, venjari, Pætur á Líknargøtu, Einar Hansen, Jóhan Troest Davidsen, Sámal Einarson, Aljosa Sarsevic, Rógvi Højgaard, Sveinur Niesen og Pól Jóhannus Justinussen. Húkandi frá vinstru: Øssur Dalbúð, Filip E. Jacobsen, Brian A. Jacobsen, Arnold Jacobsen, Bogi Løkin, liðformaður, Jann Martin Mortensen og Jens Joensen*

*Mynd: Jóannes Hansen*

**Nógvir av smádreingjunum, sum leygardagin fingu gullkrónur og FM steyp, fara ivaleyst at vera við til at manna besta liðið um nøkur ár**

FM SMÁDREINGIR
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin varð endaliga greitt, at NSÍ ikki fer at vinna fyrsta meistaraskapin nakrantíð í bestu deildini í ár. Men í NSÍ halda teir kortini, at kappingarárið hevur verið væl eydnað.

Teir hava vunnið løgmanssteypið, og hóast tað kiksaði við FM heitinum í 1. deild, so eru teir ikki sørir á FM økinum í NSÍ. Í góðu líkindunum tíðliga seinnapartin leygardagin fingu smádreingirnir gullkrónur um hálsin og FM ferðasteypið.

NSÍ vann í síðsta dystinum á GÍ, og teir vóru knáir. Teir skiftu ofta út, og teir, sum komu á vøllin, stóðu einki aftanfyri teir, sum fóru av vøllinum.

Seinast NSÍ vann smádreingjadeildina var í 1991. Fleiri av teimum, sum tá vóru FM vinnarar, vóru við til at vinna fýra FM heiti í unglingadeildini miðskeiðis í níti árunum, og nú eru teir í 1. deild.

Smádreingirnir hjá NSÍ hava fyrr í summar og aftur leygardagin víst, at tað er meiri gull í teimum. Nógvir hava fínt fótbóltshegni og fótbóltsskil. Tí er einki at ivast í, at fleiri av nøvnunum, sum eru at síggja undir myndini av glaðu FM vinnarunum, aftur og aftur fara at verða at síggja og hoyra, og at teir um ikki so nógv ár verða við í kappingini um plássini á besta liðnum.

### Ikki uttan orsøk

Tá spælararnir høvdu fingið gull og steyp, handaðu teir venjaranum Abraham Løkin blómutyssi, og teir takkaðu honum fyri arbeiði, sum hann hevði lagt í liðið í fleiri ár. So tók venjarin orðið, og hann vendi tøkkini ímóti dreingjunum, sum hann segði ikki vóru komnir sovandi til FM heitið.

Abraham hevur vant 1988 árgangin seinstu átta árini, og 1989 árgangurin hevur verið partur av liðnum annaðhvørt ár. Komandi ár verður 1988 árgangurin partur av dreingjaliðnum, og 1989 árgangurin fer saman við 1990 árganginum at arbeiða fyri at verja FM heitið, sum teir nú hava vunnið.

– Hetta er fyrstu ferð, at hesir dreingirnir vinna FM. Teir hava vunnið gull í nógvum innandura kappingum, og teir hava áður vunnið bronsu og silvur í landskappingini. Nú hevur støðuga og miðvísa arbeiðið borið gullið við sær. Dreingirnir møta til venjingar hvørja ferð, og tað er ikki bara tað. Ein hálvan tíma undan venjingini eru teir klárir at tørna til, og teir ganga inn fyri søkini við lív og sál. Tí er tað hugaligt, at teir nú hava fingið løn fyri stríðið, segði ein væl hýrdur og ikki sørt rørdur Abraham Løkin, áðrenn spælararnir, stuðlaðir av foreldrum og øðrum viðhaldsfólkum, lyftu venjaran upp í loft.

NSÍ smádreingjunum verður ynskt hjartaliga tillukku við FM heitinum.



*Meðan Abraham Løkin, venjari hjá NSÍ smádreingjunum, takkaði fyri og rósti dreingjunum fyri teirra ídni og nærlagni lurtaðu spælararnir og tey tilkomnu, eitt nú Niclas Højgaard, sum er 90 ára gamalur og heiðurslimur í NSÍ*

*Mynd: Jóannes Hansen*

## FCK stóra avbjóðing í kvøld

**Í kvøld verður á Råsunda í Stokhólmi gjørt av, um FCK skal halda fram í UEFA Cup ella ikki**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Sunnudagin var Todi Jónsson ikki við, tá FCK vann 1–0 á útivølli í Odense ímóti OB. Hann var smáskaddur í lærinum. Í kvøld skal FCK í europeiska eldin, og Todi Jónsson er í átjan manna spælarahópinum, sum í gjár kom til Stokhólm.

Mótstøðuliðið á tjóðarleikvøllinum, Råsunda, verður Djurgården. Fyri fjúrtan døgum síðani endaði tað málleyst í Parkini. Tí er einki at ivast í, at avbjóðingin hjá FCK verður stór. Svenska høvuðsstaðarfelagið er næstovast í heimligu landskappingini, har teir eru farnir undir endaspurtin, og teir mugu metast sum favorittar at sleppa víðari í UEFA kappingini.

Møguleikin hjá FCK økist nógv, um tað fer at eydnast teimum at skora sera týdningarmikla útivallarmálið. Um tað eydnast, so skal Djurgården í hvussu so er tvær ferðir fáa mál ímóti FCK verjuni, sum hevur verið sera tøtt tær seinastu vikurnar.

Í gjár var ikki greitt, um Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu. Saman við honum eru allir hinir tríggir álopsmenninir hjá FCK í Stokhólmi. Ivi var um, hvussu tað fór at verða við svenska Jörgen Pettersson, sum noyddist at fara av vøllinum í Odense, tí hann hevði fingið eitt trælær. Í gjár var ikki greitt, um hann verður førur fyri at spæla í kvøld, men hann verður undir øllum umstøðum á dómaraseðlinum.

At Jörgen Pettersson hevur skorað í tveimum teimum síðstu landskappingardystunum hevði í fyrradagin við sær, at hann aftur fekk landsliðsboð. Svensku landsliðsvenjararnir vilja hava bæði hann og FCK vongspælaran Tomas Antonelius at vera á átjan manna liðnum, tá Svøríki annan leygardag fer at spæla EM undankappingardyst ímóti Portugal.

Dysturin í kvøld millum Djurgården og FCK verður vístur á TV Danmark 1 sjónvarpsrásini.